# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 27. januar 2020 |
| Mál nr.: | 20/00039-1 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um talgildan samleika** (Loyva peningastovnum at velja millum ymiskar undirskriftarloysnir)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um talgildan samleika**
(Loyva peningastovnum at velja millum ymiskar undirskriftarloysnir)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 69 frá 9. mai 2019 um talgildan samleika verður í § 4, stk. 3 "ella elektroniska undirskriftin" strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Sambært løgtingslóg um talgildan samleika hevur talgildi samleikin tveir hentleikar, sum eru ávikavist:

- ***Eyðmerking (identifikatión)***, sum verður brúkt, tá innritað verður á talgildum tænastum
- ***Undirskrift***, sum verður brúkt, tá neyðugt er við undirskrift á talgildum tænastum

Krav er í galdandi løgtingslóg um talgildan samleika, at peningastovnarnir skulu nýta báðar omanfyristandandi hentleikar hjá talgilda samleikanum.

Hetta er avmarkandi og óheppið í mun til, hvussu menningin av talgildum samleikum í norðurlondum og Evropa fer fram í dag.

Hildið verður fast um ásetingina um, at peningastovnarnir skulu nýta eyðmerkingarhentleikan í talgilda samleikanum, men opnað verður upp fyri, at peningastovnarnir kunnu velja millum ymiskar undirskriftarloysnir.

Borgarin fer ikki at merkja mun á, um viðkomandi er í gongd við at nýta undirskriftarloysnina frá talgilda samleikanum ella frá peningastovninum, tí talgildi samleikin skal nýtast sum eyðmerking. Munurin liggur í, at partarnir koma at nýta hvør sítt tøkniligt undirstøðukervi, meðan brúkaraupplivilsið fyri borgaran verður tað sama, óansæð hvør undirskriftarloysn verður nýtt.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Krav er í galdandi løgtingslóg um talgildan samleika um, at peningastovnar, ið virka í Føroyum, skulu loyva persónum at nýta talgilda samleikan, um peningastovnurin veitir tænastu, ið krevur elektroniska undirskrift.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at opna upp fyri, at peningastovnarnir kunnu velja millum ymiskar undirskriftarloysnir.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið opnar upp fyri, at at peningastovnarnir kunnu velja annað tøkniligt undirstøðukervi enn tað frá talgilda samleikanum. Brúkaraupplivilsið fyri borgaran verður tað sama, óansæð hvør undirskriftsloysn verður nýtt, tí talgildi samleiki skal nýtast til at eyðmerkja borgaran, eisini tá hesin skrivar undir.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá peningastovunum.

Harumframt hevur uppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Um peningastovnarnir velja aðra undirskriftarloysn enn hana frá talgilda samleikanum, er sannlíkt, at talgildi samleikin verður nakað bíligari at reka fyri landið.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Tað er sannlíkt, at tað verður skjótari hjá peningastovnunum at íverkseta eina elektroniska undirskriftarloysn, tí hesir kunnu gera gagn av tí undirskriftarloysn, ið teirra KT-veitari hevur knýtt í skipanirnar hjá peningastovnunum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og uppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovnar ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í løgtingslóg um talgildan samleika verður í § 4, stk. 3 “ella elektroniska undirskriftin” strikað.

Sambært lógini hevur talgildi samleikin tveir hentleikar, sum eru ávikavist:

- ***Eyðmerking (identifikatión)***, sum verður brúkt, tá innritað verður á talgildum tænastum
- ***Undirskrift***, sum verður brúkt, tá neyðugt er við undirskrift á talgildum tænastum

Krav er í galdandi løgtingslóg um talgildan samleika, at peningastovnarnir skulu nýta báðar omanfyri standandi hentleikar hjá talgilda samleikanum.

Hetta er avmarkandi og óheppið í mun til, hvussu menningin av talgildum samleikum í norðurlondum og Evropa fer fram í dag.

Hildið verður fast um ásetingina, at peningastovnarnir skulu nýta eyðmerkingarhentleikan í talgilda samleikanum, men opnað verður upp fyri, at peningastovnarnir kunnu velja millum ymiskar undirskriftarloysnir.

Borgarin fer ikki at merkja mun á, um viðkomandi er í gongd við at nýta undirskriftarloysn frá talgilda samleikanum ella frá peningastovninum, tí talgildi samleikin skal nýtast sum eyðmerking. Munurin liggur í, at partarnir koma at nýta hvør sítt tøkniligt undirstøðukervi, meðan brúkaraupplivilsið fyri borgaran verður tað sama, óansæð hvør undirskriftarloysn verður nýtt.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Fíggjarmálaráðið, 27. januar 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason